**Aksel V. Johannesen**
***landsstýrismaður***

**Svar**

**upp á**

**skrivligan fyrispurning frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, til Aksel V. Johannesen, landsstýrismann í heilsumálum.**

**Løgtingsmál nr. S-44/2010: Viðvíkjandi útreiðslum í heilsuverkinum, býttar millum aldursbólkar.**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1) Hvussu lutfalsliga stórur er aldursbólkurin av føroyingum yvir 67 ár?

2) Hvussu lutfalsliga stórur partur av útreiðslunum hjá
   a. sjúkrahúsunum (íroknað viðgerð uttanlands) og
   b. Heilsuverkinum samlað

   verður brúktur til aldursbólkin yvir 67 ár?

3) Hvussu nógv er játtanin til Heilsuverkið hækkað, í krónum og í prosentum, undir ABC-samgonguni, 2004 – 2010?

4) Hvussu nógv er fíggjarlógin hækkað í sama tíðarskeiði?

5) Hvussu nógv er BTÚ hækkað í sama tíðarskeiði (árini 2008 – 2010 mett)?

**Svar**

**1) Hvussu lutfalsliga stórur er aldursbólkurin av føroyingum yvir 67 ár?**

Lutfalsliga er aldursbólkurin 67 ár og eldri umleið 12% av samlaða íbúgvaratalinum, sí talvuna niðanfyri:

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Lutfalsliga talið av íbúgvum 67 ár og eldri | 11,9% | 11,9% | 12,1% | 12,2% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

2) **Hvussu lutfalsliga stórur partur av útreiðslunum hjá**
   a. **sjúkrahúsunum (íroknað viðgerð uttanlands) og**
   b. **Heilsuverkinum samlað**

   **verður brúktur til aldursbólkin yvir 67 ár?**

Tað ber ikki til at siga hvussu stórur partur av útreiðslunum í Føroyska heilsuverkinum stava frá føringum 67 ár og eldri, við tað at stórur partur av útreiðslunum ikki verður býttur út á persónar.

Vit kunnu tó síggja, hvussu nógv hesin aldursbólkur nýtir sjúkrahúsini, við at hyggja eftir innleggingum og seingjardøgum. Eisini kunnu vit síggja, hvussu stóran part av viðtalunum hjá kommunulæknunum aldursbólkurin eigur.

Í talvuni niðanfyri eru lutfalslig hagtøl frá 2005 til 2009 sett upp fyri innleggingar og seingjadagar.

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Innleggingar > 67 | 23% | 22% | 23% | 26% |
| Seingjadagar > 67 | 38% | 38% | 35% | 30% |

*Kelda: Sjúklingaskráin*

Viðvíkjandi viðtalum hjá kommunulæknum, vísir uppgerð úr THS yvir vitjanir hjá kommunulæknum, at umleið 31% er fólk eldri enn 67 ár.

**3) Hvussu nógv er játtanin til Heilsuverkið hækkað, í krónum og í prosentum, undir ABC-samgonguni, 2004 – 2010?**

Fyri at svara spurninginum, eru játtanartølini fyri útreiðsluøkið Heilsumál tald saman. Tað vil siga konturnar undir grein 11 Heilsumál, sum koma undir útreiðsluøkið 20 Heilsumál.

Íløgujáttaninar og Lánsafturgjøld eru ikki tikin við, og eru Eftirlønirnar innan heilsuverkið heldur ikki tiknar við, tá ið høvuðskontan í 2008 varð flutt til Fíggjarmálaráðið at umsita.

| **Ár** | **Játtan** | **kr. øking ár til ár** | **Prosent ár til ár** | **Akk. kr. øking** | **Akk. %-øking** |
|---|---|---|---|---|---|
| 2004 | 509.431 | 0 | - | 0 | 0 |
| 2005 | 550.559 | 41.128 | 8,07 | 41.128 | 8,07 |
| 2006 | 564.199 | 13.640 | 2,48 | 54.768 | 10,75 |
| 2007 | 591.546 | 27.347 | 4,85 | 82.115 | 16,12 |
| 2008 | 666.010 | 74.464 | 12,59 | 156.579 | 30,74 |
| 2009 | 710.885 | 44.875 | 6,74 | 201.454 | 39,54 |
| 2010 | 809.460 | 98.575 | 13,87 | 300.029 | 58,89 |

tølini eru í tús. kr.

Játtanin er sostatt hækkað frá 509 mió. kr. til 809 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2004-2010. Hetta svarar til 300 mió. kr. og er ein hækkan á umleið 59 prosent.

Víst eigur at verða á, at játtanin í 2008 til heilsuøkið varð økt í sambandi við, at eykajáttan varð latin sjúkrahúsunum. Stóra hækkingin frá 2009 til 2010 stavar frá, at nærum 92 mió. kr. eru lagdar afturat játtanini í sambandi við, at Heilsutrygd er sett á stovn.

Um ein sær burtur frá hækkingini, orsakað av Heilsutrygd, er økingin í 2010 6,7 mió. kr., ella undir 1%. Við tí grundarlagnum er samlaða økingin í tíðarskeiðinum 2004-2010 gott 40 prosent.

**4) Hvussu nógv er fíggjarlógin hækkað í sama tíðarskeiði?**

Fíggjarmálaráðið upplýsir, at útreiðslur landskassans eru hækkaðar úr 3.624 mió. í 4.616 mió. í tíðarskeiðinum 2004-2009. Sambært Fíggjarlógini fyri 2010 verða útreiðslurnar 4.785 í 2010. Sí eisini talvu.

**Útreiðslur landskassans, 2004-2010**

| *Mió. kr. (netto)* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.324 | 3.467 | 3.578 | 3.767 | 4.251 | 4.370 | 4.558 |
| Løguútreiðslur | 228 | 201 | 268 | 292 | 232 | 184 | 181 |
| Rentuútreiðslur | 72 | 71 | -7 | -14 | -16 | 62 | 46 |
| **Tilsamans** | **3.624** | **3.739** | **3.839** | **4.045** | **4.467** | **4.616** | **4.785** |

Viðm: Tølini fyri 2009 eru ikki endalig, og tølini fyri 2010 eru úr fíggjarlógarlógini.

**5) Hvussu nógv er BTÚ hækkað í sama tíðarskeiði (árini 2008 – 2010 mett)?**

Hagstovan ger upp bruttotjóðarúrtøkuna og sambært teirra tølum, er BTÚ vaksið úr 10.091 mió. í 12.474 mió. í tíðarskeiðinum 2004-2008. Landsbankin hevur mett bruttotjóðarúrtøkuna fyri 2009 og 2010. Metingin er, at BTÚ var 12.200 mió. í 2009 og verður 12.600 í 2010. Sí eisini talvu.

**Bruttotjóðarúrtøka, 2004-2010**

| *Mió. kr.* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bruttotjóðarúrtøka | 10.091 | 10.398 | 11.738 | 12.413 | 12.474 | 12.200 | 12.600 |
| Vøkstur í prosentum | | **3,0** | **12,9** | **5,8** | **0,5** | **-2,2** | **3,3** |

Viðm.: 2008 er bráðfeingistøl, og 2009 og 2010 er meting hjá Landsbankanum

Tórshavn, 10. mars 2010

**Aksel V. Johannesen**
landsstýrismaður